# V Í TRUKKINUM






**FARLIGT**

*– Arbeiðið sum trukkførari er fjølbroytt, sigur Jan Johannesen*

## Linde er best

Á føroysku flakavirkjunum eru helst mong ið kennast við trukkarnar av merkinum Linde. Hesir hava staðið sína roynd gjøgnum nógv ár, og hetta er somuleiðis tað merkið, ið Jan dámar best, hóast hann her á Eiði koyrir við einum av merkinum Toyota.

- Eg vil ikki á nakran hátt siga, at trukkarnir hjá Toyota eru ringir. Als ikki. Men hinir eru bara eitt sindur betri, slær royndi trukkførarin fast.

Jan er serliga fegin um pedalirnar á Linde-trukkunum, og at teir eru kvikari at arbeiða við.

## Klokkan 16:30

Tá vit vitjaðu á Bátafiski mikudagin í farnu viku, var Jan - sum eitt undantak – fyrst møttur klokkan 8.

Hann slapp kortini ikki til arbeiðis beinanvegin, tí bíðað varð eftir at kranabilurin, ið var í aðrari uppgávu, skuldi koma. Tað gjørdi hann so tá klokkan var farin nakað av 11.

Hinvegin tók tað hvørki arbeiðsgleði ella arbeiðshug frá fólki, tí henda dagin høvdu tey nakað at gleða seg til: Asbjørn Djurhuus hevði bæði gjørt døgurða og hevði haraftrat bakað eina skuffukaku til starvsfólkini.

Og hesin dagurin gjørdist heldur ikki so langur. Jan væntaði sjálvur, at teir neyvan fóru at arbeiða longur enn til klokkan hálvgum fimm ella so.

- Men so kunnu vit eisini arbeiða heilt upp í 14 tímar aðrar dagar – og mangar eisini leygardagar, vísir hann á.

**GOTT ARBEIÐI**

*Jan Johannesen veit, hvat hann tosar um, tá evnið er trukkførari. Hann hevur koyrt trukk síðani 1986 og koyrir enn. - Hetta dámar mær sera væl, sigur hann*